**3-5. jan. 2014 RR[1]/JM**

# Kunning um verkætlanir játtaðar av Fiskivinnuroyndum 2014

## Alment:

Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.
Í trý-árs Programminum fyri 2013-2015 eru 3 raðfest øki (eins og í trý-árs programminum frammanundan[2]), sum serligur dentur verður lagdur á:

1. **Royndarveiða og virðisøking av fiski**
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar
2. **Burðardyggur fiskiskapur**
   Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar
3. **Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni**
   Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat okkara vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum.

## Játtanir fyri 2014:

Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 11 nýggjar verkætlanir av játtanini til Fiskivinnu-royndir 2014.
Harumframt er framhaldandi játtan latin 7 verkætlanum, sum byrjaðu í 2011/12 og 2013, sí fylgi-skjal 1.
**Tilsamans fáa sostatt 18 verkætlanir játtaðan stuðul í 2014-16. Tilsamans fáa hesar játtaðar 5,177 mió. kr. harav 3,703 mió. kr. eru fyri 2014,** 0,973 mió. eru fyri 2015 og 0,502 mió. eru fyri 2016.

17 nýggjar og 7 framhaldandi verkætlanir ella tilsamans 24 verkætlanir søktu upprunaliga um 9,755 mió. kr., harav 6,603 mió. fyri 2014. Samlaða játtanin til Fiskivinnuroyndir er minkað seinastu árini og er fyri 2014 3,808 mió. kr. (hálv millión minni enn árið fyri).
Í ár komu einans 17 nýggjar umsóknir móti 27 nýggjum árið fyri. Árini frammanundan hevur talið av nýggjum umsóknum verið nakað hægri – 27 í 2013 og 32 í 2012. Hví so er, er ilt at siga.[3].

Hóast færri umsóknir, er vert at leggja til merkis, at aftur í ár er fíggjarstyrkurin, sum verkætlanir søkja um frá FVR, væl undir helvtina av samlaða kostnaðinum (32,2%)[4]. Tá talan er um størri

[1] Frá 1. sept. 2013 er Samskiparin lagdur inn undir Aðalskrivstovuna v/ Rógva Reinert, aðalstjóra, móti fyrr Fiskivinnustovuni v/Andras Kristiansen, deildarstjóra.
[2] Tey 3 raðfestu økini eru tey somu, men einstøk vegleiðandi undirpunkt eru broytt nakað (víst við gulum í viðfesta Programminum fyri 2013-15).
[3] 2011(32), 2010(29), 2009(26) og 2008 (33).
[4] Í 2013(31,8%), 2012 (fyrra 28,9% og seinna 38,2%), 2011 (40,4%), í 2010 41%, í 2009 34% og í 2008 góð 42%, sum var væl minni enn í 2007, tá søkt var um 2/3 frá FVR!

eginfígging, er reiði peningurin ikki tann stóri, men heldur er talan um sum oftast “kapitaliseringar” av eginavriki ella mettum virði, sum verður latið til verkætlanina.
Mælt verður til, sum fyrr, at verkætlanirnar leggja seg meira eftir at leggja dent á at gera góða dokumentatión av eginavriki og mettum virðum í verkætlanunum. Onkur fígging kemur eisini uttanífrá.

Umsóknirnar hava verið viðgjørdar eftir sama leisti sum undanfarin ár, og eru mannagongdirnar fyri viðgerðini lýstar á heimasíðuni www.fvg.fo.
Seinnu árini hevur dentur verið lagdur á at fáa vinnufyritøkur at luttaka meira í verkætlanum, og er hetta eydnast rímiliga væl. Aftur í ár varð serligur dentur lagdur á at fáa verkætlanir innan ásettu 3 høvuðsøkini. Í ár fingu øll trý raðfestu økini stuðul eins og undanfarin ár.

Í ár hava vinnufyritøkur fingið 62% av játtanini (móti 58% í fjør, 60% fyrrárið og 54% árið fyri). Havstovan hevur fingið 28% (móti 32% í fjør, 26% fyrrárið og 36% árið fyri). Aðrir granskingarstovnar (HFS/Setrið/NVD) hava fingið 9% (móti 10% í fjør, 5% fyrrárið og 2% árið fyri).
PhD-verkætlanir hava heldur einki fingið í ár[5]. Heldur ikki nøkur umsókn um stuðul til vinnugranskara var í ár. Ein vinnugranskari var vorðin liðugur í fjør[6] og er síðani farin undir PhD-lestnað. Heldur ikki nøkur PostDoc verkætlan hevur verið í ár, men ein lítil umsókn um stuðul til at gera eina lestrar-kanning í Føroyum varð játtað. Leggja vit hesa afturat økinum, so hevur økið PhD/Vinnugr./PostDoc//lesandi fingið 1% av játtanini í ár (einki í fjør, 9% fyrrárið, 8% árið fyri og heili 25% í 2010[7]!).

Í yvirlitinum fyrikoma Granskingarkjarnurnar enn, men hesar vórðu niðurlagdar í september 2010[8]. Hetta uppbýtið av játtaðum stuðli hevur verið nýtt síðani 2004, og sæst hetta væl á stabbamyndini niðanfyri/næstu síðu. Hesaferð, eins og í fjør, hava vit býtt stuðulin til almennar verkætlanir upp í tvey – stuðul til verkætlanir á Havstovuni og stuðul til verkætlanir á øðrum stovnum enn Havstovuni[9]:




---

[5] Bert ein ætlað møgulig nýggj PhD-verkætlan søkti um stuðul í ár (fyri komandi 3 árini).
[6] PBP - Fra peptoner til Bioaktive Peptider – vinnugranskari (Atlantic Biotechnology). 1/5-09-30/4-12.
[7] Heilar 4 PhD-verkætlanir vórðu stuðlaðar í 2010. 2 vórðu stuðlaðar í 2011-12.
[8] Tær báðar nýggju Granskingarkjarnurnar: Kjarnan fyri Veiði- og Reiðskapstøkni (við denti á at minka oljunýtsluna (orkusparing)) og Kjarnan fyri Framleiðslutøkni (við denti á framleiðslu og gagnnýtslu av allari hjávøru (biotøkni)) vórðu niðurlagdar í september 2010 í samband við, at Játtanin til Granskingarætlanir á fíggjarlógini fyri 2011 fór at fella burtur.
[9] Stuðul hevur verið latin til Havstovuna (2004-14) og Fróðskaparsetur Føroya/NVD (2007-08 + 11-12 (og 2014)) og fyri 2012-14 eisini HFS.



Aðrir almennir stovnar í talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD/Setrið/HFS).

Í 2013-14 verður eingin vinnugranskaraverkætlan[10] stuðlað. Ein vinnugranskari varð liðugur í 2012[11], men ongin nýggj umsókn var fyri komandi ár.
Vinnugranskaraskipanin hjá Fiskivinnuroyndum gevur virkjum møguleika at seta ein vinnugranskara á virkinum í upp til 3 ár og fáa hann fíggjaðan við 50% upp til 300 kkr. um árið. Kravið er, at granskaraevnini[12] skulu hava støði í menningarætlanum hjá fyritøkuni, og at verkætlanin skal vera í samsvari við Programmið fyri Fiskivinnuroyndir.



Aðrir almennir stovnar í talvuni merkir aðrir almennir stovnar enn Havstovan (NVD/Setrið/HFS).

[10] Serlig føroysk skipan sí www.fvg.fo (danska Erhvervs-PhD skipanin er ikki galdandi fyri Føroyar). Møguleiki er fyri at knýta vinnuverkætlanina saman við einar vanligari PhD-verkætlan (tá vinnuvirkið gongur við til tað). Ymisku PhD-skipanirnar er øki hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo.
[11] PBP - Fra peptoner til Bioaktive Peptider – vinnugranskari (Atlantic Biotechnology). 1/5-09-30/4-12.
[12] (sí http://www.fvg.fo/Default.aspx?ID=14) .

Árligu játtanirnar í tølum og prosentum:

| Býtið kr. | 2.004 | 2.005 | 2.006 | 2.007 | 2.008 | 2.009 | 2.010 | 2.011 | 2.012 | 2.013 | 2.014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 2.045.005 | 2.424.500 | 2.185.100 | 1.975.000 | 1.975.000 | 3.162.601 | 2.272.000 | 2.721.000 | 2.557.500 | 2.453.998 | 2.300.000 |
| PhD og V.gr. | | 378.000 | 800.000 | 1.139.000 | 1.242.270 | 580.858 | 1.242.602 | 523.916 | 381.238 | - | 31.375 |
| Granskingarkj. | 481.250 | 450.000 | 641.000 | 150.000 | 460.000 | 1.117.500 | 245.000 | - | - | - | - |
| Havstovan | 2.453.750 | 1.772.000 | 1.377.000 | 1.479.750 | 1.063.750 | 140.250 | 1.241.250 | 1.658.587 | 1.096.250 | 1.356.250 | 1.021.250 |
| Aðrir alm. stovnar | | | | 258.018 | 258.018 | | | 100.000 | 200.000 | 410.600 | 350.000 |
| Tilsamans | 4.980.005 | 5.024.500 | 5.003.100 | 5.001.768 | 4.999.038 | 5.001.209 | 5.000.852 | 5.003.503 | 4.234.988 | 4.222.861 | 3.702.625 |

| Býtið í procentum | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 41 | 48 | 44 | 39 | 40 | 63 | 45 | 54 | 60 | 58 | 62 |
| PhD og V.gr. | 0 | 8 | 16 | 23 | 25 | 12 | 25 | 8 | 9 | 0 | 1 |
| Granskingarkj. | 10 | 9 | 13 | 3 | 9 | 22 | 5 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Havstovan | 49 | 35 | 28 | 30 | 21 | 3 | 25 | 36 | 26 | 32 | 28 |
| Aðrir alm. stovnar | 0 | 0 | 0 | 5 | 5 | 0 | 0 | 2 | 5 | 10 | 9 |
| Tilsamans | 100 | 100 | 101 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

Samlaða játtanin frá FVR2014 og komandi árini sær soleiðis út:

| **Samandráttur (kkr.):** | **2014-16(17)** | 2014 | 2015 | 2016/17 |
|---|---|---|---|---|
| **11 nýggjar verkætlanir hava fingið játtað (eftir tillaging/flyting/skejring):** | **3.575** | **2.451** | **622** | **502** |
| Men hesar 11 søktu upprunaliga um | 4.825 | 3.621 | 752 | 482 |
| **7 framhaldandi verkætlanir hava fingið játtað (ongin broyting):** | **1.603** | **1.251** | **351** | **0** |
| Men hesar 5 søktu upprunaliga um | 1.603 | 1.251 | 351 | 0 |
| **Hesar 18 (11+7) verkætlanir fáa tilsamans játtað:** | **5.177** | **3.703** | **973** | **502** |
| 6 nýggjar verkætlanir fingu **ikki** játtað stuðul: | 3.328 | 1.730 | 647 | 950 |
| Allar 24(18+6) verkætlanirnar bóðu upprunaliga fyri 2014-16/17 um: | 9.755 | 6.603 | 1.750 | 1.402 |

Viðfest hesum skjali er:

**- Fylgiskjal 1, sum vísir heiti og upphæddir, sum ymisku játtanirnar hava fingið fyri 2014**
**- Programm 2013-2015**
**- Lýsingin eftir umsóknum 2014**
**- Blaðlýsingin eftir umsóknum 2014**

## Fylgiskjal 1: Verkætlanir 2014:

| Id. | Navn (stytt/langt) | | | Játtað 2014 |
|---|---|---|---|---|
| | **Nýggjar verkætlanir (11):** | | | **2.451.375** |
| 13/00880 | **Optimering av rækjutroli** | BF | V | 250.000 |
| 13/00882 | **Menning av skeljavinnu og kanningarførleikum í Føroyum** | BSMF | A | 150.000 |
| 13/00883 | **TaraÁrin - Árinskanningar av taraskering á Gøtuvík og Funningsfirði** | BF/VF | V | 370.000 |
| 13/00884 | **Kortlegging av fiskileiðum - Kortlegging av hægst raðfestu fiskileiðunum hjá útróðrarmonnum sum eitt amboð at økja um burðardygga umsiting og minka um ósemjur (En: Using spatial access priority mapping to increase sustainability and reduce stakeholder conflict)** | BSMF | A | 31.375 |
| 13/00885 | **Upsarist - Skiljirist í partroling eftir upsa** | RV/BF | H | 300.000 |
| 13/00887 | **Marknaðarføring av Føroyum, føroyskum rávørum og Føroyum sum gourmetferðaland** | BSMF | V | 120.000 |
| 13/00889 | **Saltfløk uttan trykk - (Saltfløk, saltaði í bakkar í einum lagi** | VF | V | 250.000 |
| 13/00890 | **Føði hjá uppisjóvarfiski** | BF/VF | H | 220.000 |
| 13/00891 | **Grundarlag fyri býti av pelagisku fiskastovnunum** | BSMF | A | 200.000 |
| 13/00893 | **The HerGen 2014 project - Sequencing the North Atlantic herring (*Clupea harengus*) genome and development of a genetic stock management tool.** | BF | V | 410.000 |
| 13/00897 | **HERCENT - Uppsjóvarfiskur í 200 ár** | BF/VF | H | 150.000 |
| | **Framhaldandi verkætlanir (7)** | | | **1.251.250** |
| 11/01464 | **Proteglycans (PGs), glycosaminoglycans (GAGs) and collagen in the connective tissue of fish muscle** | VF | V | 0 |
| 11/01450 | **WhitefishMaLL (North Atlantic whitefish Marine Living Lab - www.WhiteFishMall.com )** | BSMF | V | 0 |
| 12/00409 | **Beinleiðis tráðleyst video-signal frá kamera til skip yvir 2 km. í sjógvi** | BF/ BSMF | V | 200.000 |
| 12/01166 | **Útbreiðsla, lívfrøði og fiskiskapur av longu og brosmu undir Føroyum** | BF/BSMF | H | 351.250 |
| 12/01154 | **Meirvirðisøking av svartkjafti til matna og úrdráttir** | RV | V | 300.000 |
| 12/01143 | **Royndir eftir blekksprutum (Octupus vulgaris - halda vit, at hon eitur. Møguliga eru fleiri sløg)** | RV | V | 150.000 |
| 12/01164 | **Blóðging av fiski, sum fær elektriskar impulsir stutt aftaná** | BF | V | 250.000 |
| | **Verkætlanir tilsamans (11+7):** | | | **3.702.625** |

Til ymiskt (framløgudag 3/3-14, lýsingar vm.) er avsett 105.375 kr., svarandi til 2,77% av 3.808 kkr.

Styttingar:

BF: Burðardyggur fiskiskapur

RVF/VF: Royndarveiða og virðisøking av fiski

BSMF: Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Vgr: Vinnugranskaraverkætlan

Phd: PhD-verkætlanir.

pD: Post Doc-verkætlan (er her íroknað almennar verkætlanir)

V: Vinnuverkætlanir,

H: Havstovan

A: Almenn verkætlan, sum ikki er Havstovan

**Programm 2013-2015**

**Stutta:**

**Stevna**
Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Raðfest øki**

**Royndarveiða og virðisøking av fiski**
**Burðardyggur fiskiskapur**
**Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni**

**Longra:**

**Stevna**
Stevnan fyri fiskivinnuroyndir er at fremja royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

**Raðfest øki**

**Royndarveiða og virðisøking av fiski**
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

- royndarveiða eftir fiskasløgum, sum ikki verða gagnnýtt sum er
- at fáa størri part av tilfeinginum til matna og finna marknaðir
- at menna tøkni og mannagongdir, ið betra um góðskuna á fiskavørum
- at lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar
- at gera lívtøkni[1] til sjálvsagdan part í gagnnýtslu av havtilfanginum
- fáa fram og nýta eginleikarnar, sum havtilfeingið hevur á fólkaheilsuna

**Burðardyggur fiskiskapur**
Hetta kunnu vera praktiskar royndir ella vísindarligar kanningar, t.d.:

- at menna tøkni, ið fer varliga við umhvørvinum og minkar um orkunýtsluna pr. kg ráfisk
- at menna vitanina um fiskalívfrøðina og vistfrøðina
- at menna skipanir fyri máting av fiskiveiðiorku

**Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni**

Hetta kunnu vera fyrisitingarligar, fíggjarligar, hagfrøðiligar, samfelagsligar ella búskaparligar kanningar ella greiningar, sum leggja afturat okkara vitan um fiskivinnuna, og harvið menna grundarlagið undir vinnuligum og politiskum avgerðum, t.d.:

- tilfeingisbúskapur og fyrisiting
- skipan av framtíðar fiskiskapi og flota undir Føroyum (íroknað ávirkan á onnur lið)
- marknaðarføringsátøk[2], ið kunnu stimbra áhugan fyri føroyskum fiski, herundir á nýggjum marknaðum.

---

[1] Biotøkni, biotechnology
[2] Tó ikki sølumessur

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

## Fiskivinnuroyndir 2014

## Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar royndir og kanningar – bæði praktiskar, vinnuligar og vísindaligar, ið menna og økja um framleidni í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiligari, búskaparligari og samfelagsligari burðardyggari gagnnýtslu av havtilfanginum.

Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:

- Burðardyggur fiskiskapur
- Royndarveiða og virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni

Serligur dentur verður lagdur á, at:

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum (almennar og/ella privatar) og/ella uttanlands.
- at verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir við fígging upp til 50%[15].

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **mánadagin 18. november 2013, kl. 12:00**

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2014.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Yviri við trond 15
FO-110 Tórshavn

[15] max. 300 kkr./ár í 3 ár

# FISKIVINNUROYNDIR 2014
## LÝSING EFTIR UMSÓKNUM

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum til tess at stuðla praktiskum, vinnuligum og vísindaligum royndum og kanningum, ið menna og økja um framleiðnið í føroyskari fiskivinnu við atliti at lívfrøðiliga, búskaparliga og samfelagsliga burðardyggari gagnnýtslu av havtilfeinginum.

**Verkætlanir, sum stuðul kann søkjast til, eru skipaðar í trý høvuðsøki:**

- Royndarveiða og virðisøking av fiski.
- Burðardyggur fiskiskapur.
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni.

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

**Les meira á fvg.fo**
Her finnur tú programmið fyri 2013-15 við fleiri undirpunktum, umsóknarblað, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar.

**Serligur dentur verður lagdur á, at:**

- Vinnan tekur lut í verkætlanini.
- Eginfígging ella onnur fígging er.
- Samstarv er við almennar og/ella privatar samstarvsfelagar í Føroyum og/ella uttanlands.
- At verkætlanin er skipað við einum stýrisbólki at fylgja við gongdini.

Fiskivinnuroyndir kunnu útluta tilsamans 3,8 mió. kr í 2014 til nýggjar og verandi verkætlanir.

Víst verður á, at møguleiki eisini er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innan fyri omanfyrinevndu øki við fígging upp til 50% (max. 300.000 kr. um árið í 3 ár).

Um tørvur er á at orða hugskot til íløkiligar verkætlanir, ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta. Áhugað eru eisini vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara, við møguligum spurningum.

Umsóknir skulu vera samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. november 2013 kl. 12:00.

**Jákup Mørkøre, samskipari**
tel.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**
Fiskimálaráðið
att.: Samskiparin í fiskivinnugransking
Postboks 347
Yviri við Strond 15
FO 110 Tórshavn

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2014.

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING